sosialurin

*Ætla at stovna Barna-samhugafelag:*

# Skal stuðla barnsins tørvi

## *Fyrireikingarbólkur skjýtur upp, at felagið fær heitið BARNABATI*



**Fólk frá slíkum feløgum, sum nú er í umbúna at stovna í Føroyum, luttaka í uppbyggingararbeiði í Guatemala**

**Nú fáa føroyingar møguleika at hava ávirkan á, hvussu ein partur av hjálpararbeiðinum í teimum tilafturskomnu londunum skal skipast.**

**Somuleiðis fáa føroyingar møguleika at hava ávirkan á, hvaðar peningur, sum verður savnaður til slík endamál, skal fara.**

**Harafturat fáa føroyingar møguleika til at seta í verk tiltøk í Føroyum børnunum at bata og virka fyri og taka ímóti stuðli í hesum sambandi.**

Hetta fer at lata seg gera í gjøgnum landsfelagið BARNABATI. Leygardagin er ætlanin at stovna eitt slíkt felag í Føroyum, um áhugi annars er til staðar.

### Føroyskt felag

Í hálvan annan mánað hevur ein fyrireikingarbólkur arbeitt við ætlanunum. Á einum tíðindafundi mánadagin varð upplýst, at bólkurin er komin til ta niðurstøðu, at stovna eitt sjálvstøðugt føroyskt felag.

— Vit eru komin ásamt um at gera eitt føroysk felag, tí vit meta, at eitt slíkt fer at arbeiða lættari og skjótari enn bert sum ein deild av tí danska felagnum Red Barnet, sigur ein av fyrireikarunum, Niels Petersen, Hvalvík.

Hann nevnir spurningin um føroyskt felag, tí tað stóð eisini føroyingum í. boði at stovna eina deild av tí danska felagnum.

Hesa leið valdi fyrireikingarbólkurin ikki, men hann hevur tikið tað sum givið, at tað føroyska felagið skal hava samvinnu við tað danska felagið, og at tað fer at søkja um upptøku í alheimssamgonguni av slíkum feløgum.

### Bygt á lokalfeløg

Sambært lógaruppskotinum, sum fyrireikingarbólkurin hevur gjørt, skal grundarlagið undir felagnum vera lokalfeløg kring í landinum.

Saman skulu lokalfeløgini virka í einum landsfelagi. Hægsta vald felagsins verður eitt umboðsráð. Í umboðsráðnum skulu tveir limir frá hvørjum lokalfelag sita. Tann árligi umboðsráðsfundurin skal velja eina fimmmannastarvsstjórn. Starvsstjórnin skal mynda landsfelagið út eftir, vegleiða lokalfeløgini, taka stig til ymisk tiltøk og annars skipa fyri felagnum.

— Men vit vóna, at tað dynamiska í felagnum verður úti í lokalfeløgunum, bæði eftir tørvi á staðnum, í landinum og eftir tørvi í heiminum, leggur Niels Petersen dent á.

### Opið felag

Fyrireikingarbólkurin leggur annars herðslu á, at felagið er ógvuliga opið bæði á ein og annan hátt.

Ein og hvør hevur høvi at gerast limur í felagnum. Og felagið er ikki bundið bert at virka fyri nøkrum ávísum uppgávum.

Felagið skal nevniliga virka sambært ST-yvirlýsingini um barnarættindi. Og skal felagið tí virka fyri at stuðla barnsins tørvi bæði burturi og heima uttan mun til tjóð, ætt, átrúna ella politiskt tilknýti.

Hetta vil siga tað sama sum, at felagið kann fara í holt við alt,sum kann stuðla barninum fyri á tann hátt at tryggja barninum bestu kor og leggja grundarlagið undir eini betri verð í tí smáa og í tí stóra.

### Borin fram í fjør

Ætlanin um at stovna slíkt felag varð borin fram á eini stevnu, sum Landsfelagið av Ungdómsfeløgum skipaði fyri seinasta heyst.

Tá varð avgjørt biða nøkur feløg um at skipa fyri stovnanini. Í fyrireikingarbólkinum hava sitið: Anker Eli Petersen fyri ungdómsfeløgini, Sølva Patursson fyri sjúkrasystrafelagið, Jóhann Mortensen fyri blaðmannafelagið, Regin Leonson fyri politiið, Ása Egholm fyri kriminalforsorgina, og harafturat nakrir einstaklingar, Peturbjørg Jensen, skrivstovukvinna, Niels Petersen, lærari og Jógvan Bæk, sálarfrøðingur.

## Tað er tørvur á Barnabata

1: Hvøn minutt verða 242 børn født. Hvørt samdøgur 348.480. Hvørja viku 2.439. 360 børn — hetta talið veksur støðugt!

2: Hvønn dag doyggja 82.000 og hvørt ár 30 milliónir børn av hungri og sjúku!

3: Hundrað túsund børn gerast árliga blind, tí tey fáa ov lítið av A-vitaminum!

4: Milliónir av børnum ganga slettis ikki í skúla. Um 40 prosent av heimsins børnum ganga bert í skúla í heilt fá ár!

5: Í »slumkvarterunum« í stórbýunum er helvtin av íbúgvunum børn!

6: Í Etiopiu er bert ein lækni fyri hvørji 70.000 fólk — í Føroyum hava vit ein lækna fyri hvørji 700 fólk!

## hornið



**— Av... avv... ryggurin.... hetta hundans urtagarðsarbeiðið.....**

Ein lesari spyr, hvat peningurin, ið inn kemur í parkeringsavgjøldum, skal nýtast til. Eg havi frætt, at teir skulu nýtast til eitt skeið at læra fólk at skyna á klokku.

— * —




**— Hvat sigur tú, eg havi altíð hildið, at tað má vera ólukksáliga stuttligt at vera djóratemjari!**

### *Óli í Áarstovu*



Ætlanin at gera fiskivinnuhavn framman fyri Landssjúkrahúsinum er helst tengd saman við at Essa skal vera 1. yvirflekjari.

— * —

Kvinnur fyri friði — takið stríðsøksina fram.